## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Kjøtbúðin v/O. Reinert:

# Gomul fyritøka í nýggjan virkisbygning

**Fríggjadagin 11. februar var móttøka í nýggja bygninginum hjá P/F Kjøtbúðin v/O. Reinert í Akranesgøtu 7 í Havn. Fyritøkan, ið síðan 1938 hevur hildið til á 80 fermetrum í Tórsgøtu, hevur nú 400 fermetrar at ráða yvir**



*Starvsfólk hjá P/F Kjøtbúðini v/O. Reinert, f.v.: Oddur Reinert, Davina Reinert, Otto Reinert, Kristian Bjarnadal, Jens Eli Jacobsen, Eyðstein Joensen, Jastrid Jacobsen, og Sámal Nielsen. Ingibjørg Rasmussen og Sigrun Danielsen vanta á myndini*

MÓTTØKA

*Myndir Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin savnaðust um 270 fólk til móttøku í Akranesgøtu í Havn, tá ein av elstu fyritøkunum í býnum, Kjøtbuðin v/O. Reinert, lat upp í stásiligum nýggjum virkisbygningi, eftir at fyritøkan hevur hildið til í somu hølum í Tórsgøtu síðan 1938.

Tað var í 1938 at Jens Reinert, pápi Otto Reinert, læt upp Kjøtbúðina í leigaðum hølum hjá Sjómansheiminum í Tórsgøtu.

Í 1958 yvirtók Otto Reinert fyritøkuna.

Til 1975 var Kjøtbúðin bæði slaktarí og handil, sum seldi allar føroyskar matvørur. Síðan hevur fyritøkan verið eitt framleiðsluvirki við døgurðmati og viðskera, ið hevur selt sínar vørur til handlar kring landið.

Gólvvíddin í nýggja bygninginum er 400 fermetrar. Nógvar av maskinunum eru nýggjar, og alt er góðkent av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og lýkur øll ES krøv. Byggifelagið Articon hevur staðið fyri bygginingini, og glastrevja-elementini innan hevur P/f Klement Petersen í Saltangará latið.

Fyritøkan framleiðir fiskafars, kjøtfars, hakkikjøt og trý sløg av pylsum.

Nógvar av vørunum vera seldar gjøgnum PM-heilsøluna í Havn.

Otto Reinert sigur, at um teir skuldu klára stóra eftirspurningur eftir teirra vørum, var neyðugt at fáa betri umstøður at arbeiða undir. Tí tóku hann og sonurin Oddur, ið eiga fyritøkuna saman, avgerð um at byggja nýggja virkisbygningin. Í fyritøkuni starvast dagliga 8-10 fólk.



*Nýggi virkisbygningurin hjá P/F Kjøtbúðini O. Reinert í Akranesgøtu í Havn*



*Nógv fólk stukku inn á gólvið til móttøkuna seinasta fríggjadag. Feðgarnir høvdu úr at gera við at heilsa uppá fólk*



*Poul Michelsen frá PM-heilsøluni, og Davina, kona Otto Reinert*



*Oddur Reinert og Petur Petersen frá Føroya Bjór*



*Jógvan Johansen og Viljormur Tórsheim ynskja tillukku við nýggja bygninginum*